


Thora Pállson:

# Fyrsta lærarinna á Tvøroyri

**Minst tríggir lærarar av Tvøroyri liggja grivnir í gamla kirkjugarði i Havn. Hans Madsen Nielsen var dani, sum rýmdi undan krígnum millum Danmark og Týskland í 1864. Ein annar var Jacob Jacobsen, sum vit fara at umrøða seinni. Hesa ferð greiða vit frá Thoru Pállson**


Óli Jacobsen
olij@sosialurin.fo

Daniel Johannes Larsen úr Porkeri gjørdist í 1889 einalærari á Tvøroyri. Skjótt varð farið at hugsa um at fáa ein lærara afturat, tí barnatalið var støðugt vaksandi. Í 1845 vóru 16 íbúgvar og tvey húski, í 1855 vóru 43 íbúgvar og seks húski, í 1870 vóru 104 íbúgvar, í 1890 vóru 258 og í 1901 vóru tey 567, sum búðu í bygdini.

Tað var heldur sjáldsamt í Føroyum við fast tilsettum kvinnuligum lærarum tá í tíðini. Men Tvøroyar fólk hildu seg framat og fingu sær Thoru Pálsson úr Havn, samstundis sum Rasmina Mortensen kom til Øravíkar-Fámjins. Tær báðar høvdu tikið prógv saman.

Thora var allar dagar kallað lærarinnan, tí hon var einsamøll lærarinna á Tvøroyri tey 33 árini, hon hevði starv í bygdini, til hon í 1926 fór frá við eftirløn.

Thora Pállson var fødd á Marknoyri í Vági í 1862. Faðirin var nólsoyingurin Vensil Pállson og móðurin var Hansine Poulina f. Gregersen úr Havn. Læraraprógv fekk hon í Havn í 1893.

## Bert kvinnur tóku læraraprógv

Hetta er einastu árið yvirhøvur, at bert kvinnur hava tikið læraraprógv.

Bert tvær ferðir fyrr høvdu kvinnur fingið útbúgving á lærarakúlanum í Havn. Tað var í 1887, tá ið fimm av seks próvtakarum vóru kvinnur og í 1890, tá ið fýra av sjey vóru kvinnur.

**Í 1893 fingu hesar prógv umframt Thora:**

Anna Trondine Joensen, dóttir Ludda í Dali. Hon giftist við Joen Paula Joensen, prentsmiðjustjóra. Tey fluttu til Noregs.

Marie Magdalene Joensen. Hon giftist við Johannes Joensen av Selatrað. Hon kom í søguna sum tann einasti lærari í Føroyum, sum var uppsøgd sum lærari, tí hon kom uppí brøðrasamkomuna.

Oluffa Joensen. Hon var dóttir Klæmint Olsen, kendur sýslumaður og politikkari í Klaksvík. Giftist við Óla Joensen, keypmanni í Klaksvík. Hon kom ikki at arbeiða sum lærarinna.

Rasminse Mortensen var dóttir Heina á Trønni í Havn. Sum nevnt gjørdist hon lærarinna í Øravík og Fámjin. Hon var lærari í sjey ár. Síðan hevði hon telefonina, postin og las lestur i Øravík.

## Gjørdist Omma Bu

Thora kom beinanvegin, hon hevði fingið prógv, suður á Tvøroyri at vera í skúlanum saman við Dánjal Larsen, sum nú varð fyrstilærari. Aftaná 1901 arbeiddi hon saman við Jacob Jacobsen, sum eisini var úr Havn. Síðan arbeiddi hon saman við skiftandi fyristøðumonnum skúlans seinast við Jørgen Bennedsen.

Hon kom sostatt at fylgja við skúlans vøkstri sum tann fasti miðdepilin heilt til tey fyrstu preliminerprógv vórðu latin í 1925.



Frammanundan Thoru Pálsson høvdu allir lærarar í Froðbiar sókn verið uttansóknarmen, tveir teirra útlendingar. Fólkatalið var, tá ið hon kom, í rívandi menning. Her var eitt ungt og virkið samfelag, og lærarinnan kom beinanvegin at vera ein livandi partur í hesum samfelagi – kanska eisini av tí, at hon hevði skyldfólk í báðar ættir í bygdini. Hon átti tvær mostrar og fleiri næstringar í faðirættini. Sjálv hevur lærarinnan verið eitt livandi menniskja. Øll tykjast at vera samd um, at hon dugdi sera væl at fara við børnunum í skúlanum, og skjótt fekk hon kelinavnið Omma Bu. Hetta dámdi henni væl og var hon ofta kallað so bæði í tiltalu og umtalu.

Thora Pállson var tiltikin fyri sín dugnaskap í handarbeiði. Tað lá til fólkaslag hennara. Fyri genturnar hevur tað verið ein stórur fyrimunur, at tær eisini í skúlanum fingu høvi til at læra at nýta hendurnar bæði til at skapa hent pløgg, prýðiligar lutir og stás.

Eisini aðrar vegir var lærarinnan ein drívandi máttur í hesi bygd, sum var full av ungdómi tey nógvu ár, hon var her. Hon eggjaði og stuðlaði øllum góðum tiltøkum, til dømis einum tónlistafelagi og í øðrum lagi einum sjónleikarfelagi.

Eina tíð høvdu eini átta ungfólk, ið høvdu nomið nakað av musikki aðrastaðni, tikið seg saman, og lærarinnan var altíð fús at fáa tey til at halda hendan góða dugnaskap viðlíka og at halda konsertir.

Tað vóru fýra ungar kvinnur og fýra menn, og tey leiktu á fiól, urgu og klaver.

Sjónleikirnir vóru júst í hesum árum nýskrivaðir og frískir hjá Rasmus Effersøe og Hans Andreas Djurhuus, so hetta var eisini forkunnugt.

Omma Bu legði lag á sjálva framførsluna, stílaði fyri klædnapløggum og tílíkum. Hon seymaði sjálv, um so var neyðugt.

Thora Pállson kom soleiðis at uppliva framburðstíðina á Tvøroyri og sjálv at seta dám á hana. Tað mestu tíðina búði hon í hugnaligu hølum sínum á skúlaloftinum. Ógift var hon og hevði tí bæði hug og stundir til at vera millum skyldfólk og vinir aftaná skúlatíð.

Thora gjørdist heiðurslimur í Føroya Lærarafelag í 1925, og hevur hetta verið ein viðurkenning fyri arbeiðið hon gjørdi.



*Læraraflokkurin 1893 bert við kvinnum. **Aftanfyri f.v.** Maria Joensen og Rasmina Mortensen. **Frammanfyri:** Anna Trondine Joensen og Thora Pállson. Oluffa Joensen er ikki á myndini*

*THORA PÁLSSON*
*F. 18. APRÍL 1862*
*D. 13. OKTOBER 1928*
*GUD ER KÆRLEIKI*



*Thora Pállson*

## Kom aftur til Havnar

Tá ið hon fór frá í 1926, fór hon til Havnar og bygdi hús saman við systir síni Svanhildu og sváginum Georg Long. Tey áttu Richard Long, sum var kendur sum skúlamaður og politikkari. Men ikki vóru tey saman í meira enn tvey ár. Omma Bu andaðist í 1928, og nú hvíla hesi trý nærum lið um lið í gamla kirkjugarði í Havn.

M. S. Viðstein greiðir frá um Georg Long, at hann var við í tónleikarlívinum í Havn saman við Bakar Hansen, sum skipaði fyri Føroya fyrstu strúkikvartett saman við Georg Long, prentsmiðjustjóra, Emil Traber og Dia við Stein. Hetta er helst byrjað í 1882.

Georg Hansen arbeiddi eisini eitt drúgt tíðarskeið við kórsangi, dúgliga stuðlaður av Georg Long.

*Keldur:*
Elgerda Jacobsen: Skúlaskapur í Froðbiar sókn
Lærarafólk í Føroyum
Ingrið Sondum
M.S. Viðstein: Horvnar Havnarmyndir



*Traber, Georg Long, svágur Thoru, bakar Hansen og Dia við Stein spæla til konsert í "velgørenheds øjemed." Tekning: William Heinesen*

**Næstu ferð:**
Komandi partur verður um Skora-Pól, sum var uppsitari hjá sorinskrivaranum í Norðadali